Kristina Háfoss
løgtingsmaður

Nr. 22/2020

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um lægstu lønirnar, livikostnað og almennu lønarskipanina í Føroyum, settur landsstýrismanninum við fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Heldur landsstýrismaðurin, at starvsfólk við lægstu lønunum – hóast hesi starvast fulla tíð – kunnu liva í fátækraváða í Føroyum?
2. Hvussu nógv er nú í miðal eftir at liva fyri um mánaðin fyri tey, ið hava lægstu mánaðarløn hjá landinum?
3. Hvussu nógv er lægsta mánaðarlønin hjá landinum hækkað seinastu 25 árini í krónum og %?
4. Hvussu nógv eru tænastumannalønirnar hækkaðar seinastu 25 árini í krónum og %?
5. Hvussu nógv er kostnaðarstøðið / prístalið hækkað seinastu 25 árini?
6. Heldur landsstýrismaðurin, at fleiri almenn størv hava størri krøv og krevja fleiri førleikar nú, enn áður?
7. Heldur landsstýrismaðurin, at almenna lønarskipanin er tillagað nøktandi, samsvarandi broytingunum í innihaldi og í krøvum til starvsfólk, seinastu mongu árini?
8. Ætlar landsstýrismaðurin at endurnýggja almennu lønarskipanina?

Viðmerkingar:
Føroyar eru millum heimsins ríkastu lond. Tað eru tó ikki øll, ið kenna ágóðan av hesum í nóg stóran mun. Kostnaðarstøðið í Føroyum er høgt og hevur verið vaksandi – eins og í øðrum londum. Hetta hevur ávirkan á, hvat fólk hava eftir at liva fyri, og hetta ávirkar fyrst og fremst tey, ið hava lægstu lønirnar.
Seinnu árini er landsskatturin á lægru inntøkunum lækkaður munandi, og hetta hevur økt nettoinntøkuna, men kostnaðarstøðið er høgt, og framhaldandi eru tí eisini fleiri, ið hava trupult við at klára seg við lægstu lønunum.
Okkara samfelag broytist støðugt. Tað gera okkara arbeiðspláss og krøv til starvsfólk eisini. Tí er eisini neyðugt støðugt at tillaga lønarskipanir v.m. samsvarandi.
Í undanfarna valskeiði varð arbeiði sett í gongd, ið hevði til endamáls at fáa samstarv millum fakfeløg og landið um at endurnýggja almennu lønarskipanina, so skipanin kundi gerast meira tíðarhóskandi, gjøgnumskygd og smidlig. Arbeiðið bar ikki á mál tá, men er ikki minni týðandi at fáa framt í dag.
Fyri at frætta, um landsstýrismaðurin ætlar at gera eina roynd at taka arbeiðið uppaftur saman við fakfeløgunum, og fyri at fáa lýst støðuna hjá teimum, ið hava lægstu lønirnar, eisini í mun til broytingar í kostnaðarstøðinum og samfelagnum, verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 21. september 2020

Kristina Háfoss